# Ein súkklutúr oman á bryggjuna

**Hóast Árnafjørður er lítil bygd, so finst bæði við skúli og felagslív her. Hinvegin, so kundi talið av ungdómi helst verið størri.**
**– Eg keði meg onkutíð, men kortini ikki so leingi, sigur 16 ára gamli árnfirðingurin, Teitur Askham Olsen**



*Súkklan er góð at hava, hóast bygdin er lítil*
*Mynd: Høgni Thomsen*

## Bygdarlív

**Snorri Brend**
snorri@sosialurin.fo

**Árnafjørður:** Ein stórur aliringur breiðir seg út her á havnarlagnum. Eitt greitt tekin um at vinnulív er í hesi fjarskotnu bygdini.

Ein maður er í ferð við onkra umvæling. Nær hjá honum stendur ein ungur drongur í húgvu við súkklu síni og prátar.

Teitur er liðugur við skúladag sín í Ósáskúlanum í Klaksvík. Í góðveðrinum henda mikudagin í farnu viku hevur hann tikið súkkluna fram og hevur lagt sær leiðina oman á havnarlagið.

Løtu seinni kemur ein annar drongur úr bygdini oman higar. Hann hevur okkurt etandi í hondini. Teir práta saman eina løtu og fara síðani niðan í bygdina aftur.

– Tað eru ikki so nógv onnur ung í mínum aldri her í Árnafirði, sigur Teitur.

### Vinir í grannabygdini

Hóast mong kundu hildið, at tíðin stendur still í Árnafirði, so er tað kortini ikki heilt rætt. Her finnast m.a. eitt virkið kappróðrarfelag og bygdarfelag.

Bygdarfelagið hevur sett spakan í jørðina til nýtt felagshús, og fyri jól varð nýggja kappróðrarneystið tikið í nýtslu. Her finnast eisini rógvimaskinur og annað, ið hoyrir til eitt slíkt felag í 2007.

– Tað er sera stuttligt at vera í nýggja neystinum. Har eru nógvar góðar maskinur, - og jú, har eri eg viðhvørt, sigur Teitur.

Hann er tó sjáldan einsamallur her, tí teir sum manna kappróðrarbátin í bygdini venja regluliga í hølunum í niðaru hæddini í neystinum.

Í bygdini eru hinvegin ikki nógv onnur ung á sama aldri sum Teitur, men hann er heppin, tí hann eigur eisini vinir í grannabygdunum.

– Eg eri rættiliga ofta norðuri í Hvannasundi. Har eigi eg fleiri systkinabørn, sigur hann.

### Framtíðin kemur

Teitur gongur sum nevnt seinasta árið í framhaldsdeildini, og nú eru bert fáir mánaðir eftir av hesum skúlaárinum.

– Hvat eg fari at gera aftaná?! Tað ani eg ikki. Eg fari tó ikki í skúla beinanvegin - kanska um eitt ár, sigur hann.

> *”Eg fekk mær fyrst ein døgurðabita, og fór síðani ein súkklutúr her oman á havnarlagið”*

Hetta árið kundi hann hugsað sær at funnið okkurt arbeiði, meðan hann finnur útav, hvørja leið framtíðina skal taka.

Henda mikudagin vit hittu Teitur á havnarlagnum í Árnafirði var hann komin úr skúlanum klokkan hálvgum tólv.

– Eg fekk mær fyrst ein døgurðabita, og fór síðani ein súkklutúr her oman á havnarlagið, sigur Teitur.

Hvussu skráin sá út restina av degnum visti hann ikki reiðiliga. Tað er í øllum førum hvørki fótbóltur ella annar ítróttur á skránni henda seinnapartin.

Hann hevur teldu heima við hús, og fer hon við nakað av tíð.

– Vit ætla at fáa okkum breiðband, sigur Teitur.

Óhugsandi er ikki, at meiri tíð fer at fara frammanfyri telduni, tá hetta sambandið gerst veruleiki.

### Lovsangsbólkur í Solo

Er tað nakað sum altíð hevur fylt nógv í lívinum hjá Teituri, man tað vera kristin sangur og tónleikur. Sjálvur spælir hann bass.

– Eg spæli við í lovsangsbólkinum í Soli Deo Gloria, sigur Teitur, sum hevur spælt guitar leingi.

Áhugan fyri sangi hevur hann í øllum førum ikki frá ongum: Pápin, Theodor er ein av limunum í kenda og vælumtókta sangbólkinum Ecclesia, sum mong kenna frá kvøðuljómunum í útvarpinum.

Um Teitur fer at fylgja pápanum og familjuni annars innan tónleikaheimin, dugir hann ikki siga her og nú.

– Kanska. Vit fáa at síggja!, sigur hann so vísiliga.